Um vikuskiftið spældu smádreingir heystkapping í Vági, og vertirnir úr VB vunnu kappingina. Teir vunnu sinar dystir móti GÍ og MB, og fingu steyp til ognar. Á liðnum vóru: Heini Jacobsen, Kári í Lágabø, Eyðstein í Lágabø, Nap. Danberg, Jón Kjærbæk, Sonny Kjærbo, Bárður Nielsen, Birgir Nielsen, Alex Nielsen, Joen P. Thomassen, Dan Knudsen, Sonny Sondá, Sveinur Bech, Hans A. Nielsen, John Poulsen, Jón Vestergård, Eyðstein Vágfjall og Bergur Strøm. ***Mynd: Rógvi Johansen***

Billard fyri tey ungu í Margarine-fabrikkini

Tá tað verður sagt, at so lítið er at fara til hjá teimum ungu, hoyra vit eisini mong siga, at her er ov mikið av ítrivum. Og her verður serstakliga hugsað um tær mongu ítróttargreinirnar, skótalív osfr. Síðani Margarinefabrikkin lat upp í høvuðsstaðnum hava her eisini verið onnur tilboð til teirra, sum hvørki dáma vanligu ítróttargreinarnar, ið krevja kropsstyrki, ella skótalívið fyri bert at taka tvey dømi.

Nú karmurin er skaptur er so ætlanin at rúmka um innihaldið - tiltøkini - í Margarinefabrikkini við at lata tey ungu spæla billard tvær reisir um vikuna, í hvussu so er at byrja við.

Tórhallur Jakobsen, leiðari á Margarinefabrikkini sigur, at teir leingi hava arbeitt við ætlanini at gera nakað burtur úr billardinum, sum hann heldur er eitt frálíkt ítriv hjá teimum ungu.

Í hesum sambandi hevur Margarinefabrikkin eisini útvegað sær eitt gott billardborð. Men billard krevur so eisini bæði venjing og vegleiðing. Tað hevur her nógv at siga at duga at fara væl um borðið, tí kemur hol á dúkin er lítil dugur í honum. Her skal tí fólk til at stíla fyri og leggja teimum ungu lag á.

Tórhallur Jakobsen hevur tí heitt á tveir av billardspælarunum hjá Mimi, Steinbjørn í Dali og Jan Müller, um at leggja teimum ungu lag á. Er stórur áhugi millum tey ungu, so er eisini ætlanin at fáa spælarar úr øðrum billardfeløgum at vera við til at leggja teimum ungu í Margarinefabrikkini lag á.

Ætlanin er at hava opið fyri ungum millum 13 og 25 ár hvønn mikudag og hósdag millum klokkan 19 og 21. Byrjað verður í dag og vónar leiðarin á Margarinefabrikkini, at nógv ung fara at møta upp hetta fyrsta kvøldið, soleiðis at tað ber til at leggja hetta væl til rættis. Billard er bæði fyri gentur og dreingir.

Sambandið um Suðuroyarfjørð í leysum lofti

Viðmerking

Hergeir Nielsen skrivar

Suðuroyar Tjóðveldisfelag skipaði farna vetur fyri einum fundi um samferðsluviðurskiftini um Suðuroyarfjørð. Her luttóku landsstýrismaðurin, SL-stjórin, og umboð fyri landsverkfrøðing og serkøn á flutningsøkinum saman við úti við 200 suðringum.

Stutt kann sigast, at eingin á hesum fjølmenta fundi ynskti nakað samband um Sandoynna, og at hurlivasin um summarið, serliga viðvíkjandi seinkingum av Havnini, kortini varð eins og hann plagdi farna summar.

Fyri at beina fyri Suðuroynni sum part av ferðamannavinnuni hevur SL tann kongstanka, at ein stýrimaður skal kunna lastað hálvthundrað til hundrað bilar saman við øðrum farmi upp á hálvan taíma. Hóast skipið hevur ligið deytt á Havnini í ein heilan dag, so sleppur hann av sparingsorsøkum ikki at tørna til saman við restini av manningini fyrr enn kl. 17 við fráferð kl. 17.30.

Tað kiksar sjálvandi hvørja ferð, og taparar eru tey, sum ferð eftir ferð ikki sleppa við, tá ið tey skulu, saman við øllum teimum, ið ongantíð náa tí, tey hava sett sær fyri. At skipa fyri tiltøkum í Suðuroynni um kl. 20 til 20.30 hevur SL soleiðis beinleiðis spent bein fyri.

SL sparir ein hálvan tíma í fyrra endanum, og rindar tað dupulta í hinum. Fremmandafólk ræðast tílík viðurskifti saman við støðugu broytingunum í útvarpslýsingunum, sum tey ikki fáa fatur í. Tey halda seg sjálvandi burtur eina aðru ferð og ávarða samsintum móti at royna tílíkt. T.d. stó ein heilan mánaða í tekstvarpinum í summar, at fráferð var av Drelnesi kl. 7 fríggjamorgum, meðan skipið sigldi kl. 6.10.

Og nú 26. september veit farstøðin at siga, at fráferð fríggjadagin 27. september er kl. 6.10, meðan skipaið kortini siglir kl. 7.00. Allan vegin ígjøgnum merkist ein himmalrópandi líkasæla við hvussu viðurskiftini hjá suðringum eiga at vera, ella eisini er her talan um eitt heilt seligt slag av alment løntum skemti.

Tað hevur á umrøddu fundi og øðrum við, í blaðgreinum støðugt, verið víst á, at SL ikki er ført fyri at reka eina nøktandi samferðslu upp á Suðuroynna. Tá útlitini nú gerast enn ótryggari verður mælt til, at henda farleið verður stýrd úr Suðuroynni, so at hon kemur at tæna teimum, ið her búgva, á frægasta hátt.

Vit hava her eitt upplagt høvi at átaka okkum ein part av almennu umsitingini í útjaðaranum, og ein sonn frægd hevði tað verið at sloppi at brúkt eitt framkomið samferðslumynstur, har tú røkkur øðrum sambondum, ið fara úr miðstaðarøkinum, heldur enn at siggja í afturpartin á teimum.

Skal Smyril t.d. nýtast um fjørðin eina tíð, so er tað ein sjálvfygla, at kømurini á afturdekkinum standa opin uttan nakran meirkostnað fyri tey ferðandi. Ein eins stór sjálvfylgja er, at suðringar, ið koma heim um høgtíðirnar, fáa loyvi at verða heima um høgtíðirnar í staðin fyri at liggja tær av í onkrum gistingarhúsi norðanfjørðs, tí at SL heldur tað verða ov dýrt at sigla, tá ið siglast skal.

Og soleiðis kundu túsund ting og fleiri enn verið tikin fram, - men til hvørja nyttu, nú alt hongur í leysum lofti?

Í 1975 var tað løgtingsins vilji við lóg at keypa Smyril, og í 1980 Teistan. Nú um dagarnar hevur ein landsstýrismaður sum tjóvur á nátt tikið sær heimildina at selja so sum honum lýstir, uttan at sama løgting veður spurt eftir.

Hann sigur seg ætla at selja Smyril, og hevur longu selt Teistan. Hann vil kortini einki siga um søluupphæddina, sum eftir hesum at døma neyvan kemur fyri ein dag, fyrr enn hon verður bókað sum ein søla á status í landskassaroknskapinum. Er hon kanska einar 23 mió. kr., so skal hann ivaleyst leita leingi og væl, fyrr hann finnur nakað líkinda Suðuroyarskip fyri henda penning.

Mannagongdin higartil við keyp og sølu av strandfaraskipum hevur verið fyrst at útvega nýtt skip, áður enn støða verður tikin til sølu av øðrum. Løgtingið hevur so í hvørjum einstøkum føri sagt sína hugsan um samferðsluviðurskiftini á leiðini, og soleiðis við lóg lagt støðið undir tann sjóvegis útbúnað og tænastustøðið, ið strandferðslan hevur ræðið á.

Sum á so mongum øðrum økjum her í samfelagnum, so er eisini á hesum øki alt vent á høvdið. Nú verður selt fyrst, og sostatt verður í hesum føri løgtingslóg nr. 30 frá 28. mars 1980 um keyp av strandfaraskipi sett til viks. Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í samferðslumálum, strikar sostatt eina løgtingslóg móti løgtingsins vilja.

Hvør er omanfyri hvønn, hava vit hug at spyrja?

Í øðrum londum verða tær størstu og dýrastu farleiðirnar, ferjur, tunlar, brýr, motorvegir og flogvallir, endavend fleiri ferðir av nevndum innan- og uttantings, áðrenn tær verða samtyktar ella vrakaðar ella av avvarðandi fólkavaldu parlamentum. Soleiðis hevur eisini verið hjá okkum, men nú hevur landsstýrið tikið upp annan tátt og latið í íløgu og rakstri tað nógv størsta ferðasambandið í Føroyum upp í hendi á einum manni, - landsstýrismanninum í samferðslumálum.

Sanniliga er talan um broyttar tíðir.

Eftir gomlu stýrisskipanarlógini skuldi søla av landsins ognum og nýtslurætti av hesum fara fram sambært løgtingslóg,m en er hetta ikki nevnt í verandi stýrisskipanarlóg. Hinvegin, so stendur heldur ikki nakað um, at tílík mál ikki skulu leggjast fyri tingið.

Í § 43 stendur, at: *»Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri figgjarlóg, ið er í gildi, tá ið ávist verður«*, og sigur hetta so mikið sum tað, at søluinntøkan av Teistanum ikkikann brúkast til at figgja hall hjá SL. Eitt landsstýri kann ikki fara og selja út av landsins ognum fyri at fáa til rakstur á figgjarlógini.

At útvega nýtt skip um Suðuroyarfjørð er eitt ovurstórt mál fyri suðringar, eins og tað er tað fyri landskassan. Bý og bygdaráð teirra vita av ongum, fólkið veit av ongum og alt bendir á, at her skal handlast í einari knappari vending, áður enn nakar fær lagt seg út í málið.

Ætla menn at lata tað upp í hendi á landsstýrismanninum at avgera um vit fara at fáa eitt av teimum skraddaraseymaðu skipunum hjá sambandinum, hvar helvtin av teimum ferðandi koma at sita sum palstúttir umborð á einar 3-4 tímar, meðan hin helvtin gongur eftir í Havn?

Ella kanska okkurt enn verri?

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Ja!

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið ***5 ferðir um vikuna.***

☐ **Haldarar í Føroyum:** 235,-/ársfj.
☐ **Haldarar í Danmark:** 425,-/ársfj.
☐ **Haldarar í Danmark:** (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
☐ **Onnur lond:** Ymiskir prísir

Til ber at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av árfjórðinginum

Navn: .....
Bústaður: .....
.....
Postnr., bygd/býur: .....
.....
Tlf.: ..... **Undirskrift:** .....